Stjørnan-Neistin 21-20 (10-11):

# Seinasta skotið bjargaði stigunum

**Í seinasta sekundinum av dystinum gjørdi toppskjúttin hjá Stjørnuni málið, sum tryggjaði heimaliðnum sigurin í einum dysti, har gestirnir vóru frammanfyri meginpartin av tíðini**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*



*Talan var um ein sera spennandi dyst, tá Stjørnan í seinasta sekundinum av dystinum tryggjaði sær sigurin á Neistanum*

*Mynd: SjH*

Mest dramatiski dysturin í Klaksvík í hesum kappingarárinum endaði við, at heimaliðið fekk bæði stigini, hóast útiliðið leingi líktist vinnara av dystinum.

Stjørnan skinklaði í stórum pørtum av dystum, og tær løturnar, Neistin fekk sítt spæl at ganga, tóku havnakvinnurnar seg fram um við fleiri málum. Tær kláraðu tó ongantíð at halda fast um leiðsluna, og ábendingar vóru allatíðina um, at Stjørnan kundi koma afturíaftur, um tær bara fingu skil á spælið hjá sær.

Neistin byrjaði dystin sannførandi, og fyrsta kortérið lýsti Neistin bjartari enn Stjørnan. Tær hildu púra tætt í verjuni, samstundis sum álopsspælið var flótandi og uppfinnsamt. Stjørnan kláraði ikki at steðga Neistanum, tá tær løgdu trýst á, og var tað ikki onkur av bakspælarunum, sum sendi bóltin í málið, so syrgdu snildisligu fríspælingarnar av strikuni fyri, at Neistin fekk nógv mál fyrsta partin av dystinum.

### Stjørnan ressaðist

Tá eitt korter var spælt var Neistin á odda 8-3, og hesa løtuna var eingin ivi um, hvat av liðunum var omaná. Neistin legði harðliga fyri, og tað tók heimaliðið á bóli. Álopsspælið hjá Stjørnuni gekk illa, og hevði tað ikki verið fyri toppskjúttan, Simonu Dzuigyte, sum viðhvørt bara hoppaði upp og drønaði í kassan, so hevði staðið illa til hjá heimaliðnum.

Seinasta partin av fyrra hálvleiki kom Stjørnan fyri seg. Verjuspælið gjørdist meira kontant, og hetta steðgaði flótandi spælinum hjá Neistanum. Í hinum endanum vóru onkrir glottar at síggja, men tað var fyrst og fremst Simona Dzuigyte, sum helt Stjørnuni inni í dystinum.

Tá liðini fóru til hálvleikssteðgin var bara eitt mál á muni, og tað var líkt til, at Stjørnan var komin fyri seg aftur, og at Neistin skuldi fara at fáa tað trupult í seinna hálvleiki.

Men so var ikki.

Stjørnan legði seg fram um fyri fyrstu ferð í dystinum, tá 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, men so vaknaði Neistin aftur, og tær tóku seg um reiggj.

Næstu løtuna høvdu tær úr høvuðsstaðnum munin, og tær øktu leiðsluna upp í trý mál. Tá var eitt korter eftir av dystinum, og Stjørnan fekk ein seinasta kjans at vinna seg inn í dystin aftur.

Tað eydnaðist eisini hjá Stjørnuni, og tað var fyrst og fremst takka verið góðum vongspæli og málmansspæli. Anna Kristina Samson gjørdi trý frálík mál av vinstra vongi, og hon fekk eisini tvey brotskøst, sum gjørdu góðan mun. Í málinum bjargaði Agné Masenaite fleiri ferðir frálíka væl, tá Neistakvinur høvdu gyltar møguleikar.

Hetta gjørdi, at støðan var 20-20, tá tveir minuttir vóru eftir at spæla. Neistin fekk ein seinasta kjans at gera mál, men tað bar ikki til.

### Dramatiskur endi

Stjørnan slapp so í sítt seinasta álop, tá tað var ein hálvur minuttur eftir at spæla. Neistin var í undirtali, og ein støða endaði síðani við, at ein Neistakvinna afturat var tveitt út í tveir minuttir. Tá vóru átta sekund eftir at spæla, og teir seks Stjørnuspælararnir høvdu sín seinasta møguleika móti teimum fýra hjá Neistanum.

Stjørnuvenjarin kallaði sínar spælarar í samráð, meðan KÍ-høllin kókaði, og tað var greitt, at nú skuldi eina ætlan leggjast fyri seinasta skotið. Tann ætlanin tók ongan á bóli, tí lagt var upp til, at Simona Dzuigyte skuldi avslutta.

Tað gjørdi hon, men Neistamálverjin bjargaði.

Onkursvegna eydnaðist tað í eini skjótari vending Andrijanu Milodanovic at tveita innkastið inn til Simonu, sum í øllum meldrinum mitt fyri drønaði bóltin málið. Bókstavliga talt í seinasta sekundi.

21-20 og so gleddust ovurfegnir Stjørnuspælarar um sigurin. Neistakvinnur vóru vónbrotnar, tí tær høvdu møguleikan at stjala bæði stigini. Tá avtornaði fingu tær einki, og so er silvurvónin helst eisini rokin.

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskine | Sóljan | 135 | (20) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 133 | (38) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 107 | (47) |
| Gabriella Fekete | VB | 104 | (26) |
| Ioana Rápa | VÍF | 97 | (23) |
| Regina Radó | VB | 86 | (21) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 78 | (2) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 76 | (12) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 76 | (35) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 75 | (13) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 66 | (1) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 66 | (9) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 64 | (12) |
| Birita Wardum | Neistin | 62 | (10) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 58 | (1) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bjarni Wardum | H71 | 110 | (27) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 106 | (15) |
| Heini Joensen | Neistin | 104 | (32) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 95 | (28) |
| Høgni Klein | Kyndil | 93 | (7) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 91 | |
| Ingi Olsen | VÍF | 91 | (11) |
| Finnur Hansson | H71 | 89 | (21) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 87 | (11) |
| Sámal Joensen | VÍF | 86 | (13) |
| Durica Tomic | KÍF | 83 | (22) |
| Iljan Topic | KÍF | 82 | |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 78 | (9) |
| Artur Johansen | StÍF | 73 | (5) |
| Áki Olsen | VÍF | 71 | (10) |

### Dysturin í tølum

**Stjørnan-Neistin 21-20 (10-11)**

***Málskjúttar:***

***Stjørnan:*** Simona Dzuigyte 8 (2), Anna Kristina Samson 6, Andrijana Milodanovic 6 (2), Joan Midjord Joensen 1

***Neistin:*** Súna Mørk 5, Katrin Dam á Neystabø 4, Gunnleyg Berg 4, Mildrið Jacobsen 3, Birita Wardum 3, Susan Brockie 1.

***Brotskøst:*** Stjørnan 7, Neistin 2

***Útvísingar:*** Stjørnan 1, Neistin 5

***Dómarar:*** Uni Wardum og Hannis Wardum. Dømdu við myndugleika og góðari linju. Sáttligi, men avgjørdi stílurin var sannførandi.

## Dunkurin rakti smágentu

**Stjørnan fer at kæra atburðin hjá neistaleikara eftir dystin sunnudagin**

Tað var um reppið, at álvarsligur skaði stóðst av, tá dysturin millum kvinnuliðini hjá Stjørnuni og Neistanum var liðugt leiktur sunnudagin.

Í mest sum berari frustratión um at Stjørnan hevði skorað sigursmálið í seinastu løtu, og harvið mest sum tryggaði sær silvurmerkini, ripaði ein av neistaleikarunum vatndunkin frá sær. Dunkurin rakti eina smágentu, sum stóð á vøllinum, men lukkutíð tók økslin fyri, soleiðis at álvarsligur skaði ikki stóðst av tilburðinum, tó at lítla gentan sjálvsagt var skelkað.

Í Stjørnuni halda tey atburðin hjá leikaranum vera undir alt lágmark, og fara tey tískil at kæra hetta til Hondbóltssambandið.

Í Neistanum halda tey hinvegin ikki, at málið hevur so nógv upp á seg, sum klaksvíkingar vilja hava tað til.

Fyrst og fremst siga tey, at áskoðarararnir sum so einki hava at gera á vøllinum eftir dystin, og harumframt var talan um eitt óhapp av heldur keðiliga slagnum.

- Sjálvandi eigur slíkt ikki at henda, men talan var um frustratión, og bæði leikari og venjari fóru beint yvir at biðja gentuna um orsakað eftir tilburðin, verður sagt úr Neistanum, har tey annars harmast tilburðin.

***-jm***

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 443 | 265 | 178 | 18 |
| 2 | Stjørnan | 3 | 3 - 0 - 0 | 401 | 313 | 88 | 15 |
| 3 | VB | 4 | 3 - 1 - 0 | 377 | 380 | -3 | 13 |
| 4 | Neistin | 4 | 1 - 1 - 2 | 344 | 312 | 32 | 11 |
| 5 | Kyndil | 3 | 0 - 0 - 3 | 338 | 396 | -58 | 3 |
| 6 | StÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 269 | 351 | -82 | 3 |
| 7 | Sóljan | 4 | 0 - 0 - 4 | 285 | 440 | -155 | 2 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 470 | 386 | 84 | 19 |
| 2 | Neistin | 4 | 3 - 0 - 1 | 494 | 415 | 79 | 16 |
| 3 | StÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 415 | 402 | 13 | 10 |
| 4 | Tjaldur | 4 | 2 - 0 - 2 | 401 | 448 | -47 | 8 |
| 5 | H71 | 4 | 0 - 1 - 3 | 438 | 466 | -28 | 7 |
| 6 | Kyndil | 3 | 1 - 1 - 1 | 342 | 395 | -53 | 5 |
| 7 | KÍF | 4 | 0 - 0 - 4 | 415 | 463 | -48 | 4 |



# Todi tekur ein dag í senn

**Álopsspælarin í FCK heldur tað vera sera stóra avbjóðing at spæla ímóti týska landsliðnum, men nógvu skaðarnir seinastu tíðina gera, at Todi ikki droymir um at koma á landsliðið**

ÚTISETAPRÀT
*Jóannes Hansen*



*Tað hevði verið ein stór avbjóðing at spælt ímóti Týskalandi. Men tað hevur størri týdning at síggja, hvussu dagurin í morgin fer at roynast*

Man Todi ætla sær at spæla aftur á landsliðnum. Spurningurin hevur ofta verið á lofti seinastu mánaðirnar, og nú lutakastið til EM undankappingina hevur verið, eru tey ivaleyst fleiri, sum knýta vánirnar fyri hampuligum úrsliti afturat, um Todi Jónsson verður í álopinum ella ikki.

Annar av abbunum hjá Toda var íslendingur, og hin var skoti. Tað vil siga, at hann hevði havt møguleika at spæla bæði á íslendska og skotska landsliðnum. At spæla ímóti hesum landsliðunum og ikki minst at spæla ímóti Týskalandi eiga at vera avbjóðingar, sum Todi hevði trivist við.

Ella hvussu?

– Vit hava spælt undankappingardystir ímóti Skotlandi, og tað havi eg altíð kent sum stórar avbjóðingar. Vit hava spælt venjingardystir ímóti Íslandi, og vit hava verið heilt tætt við at fingið góð úrslit ímóti teimum. Nú verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at roynast, tá stig fara at standa upp á spæl í undankapping. At Føroyar nú skulu spæla ímóti Týskalandi eigur at vera ein so stór avbjóðing, sum tað ber til at fáa hjá føroyskum fótbóltsspælarum.

Og droymir tú um, at tú verður á landsliðnum, tá EM undankappingin kemur fyri?

– Royndirnar tey seinnu árini hava við sær, at eg haldi meg til støðuna í dag, og so fáa vit at síggja, hvussu tað verður í morgin. Síðani tíðliga síðsta summar havi eg bara spælt tríggjar ella fýra landskappingardystir. Eg havi verið skaddur, og tað, sum eg hugsi um er hvønn dag ar arbeiða miðvíst fyri at koma fyri meg, so eg aftur verði førur fyri at spæla á liðnum hjá FCK. Í løtuni er landsliðið ikki fremst í huganum, men sjálvandi fegnist eg saman við øllum øðrum føroyingum um góða lutakastið.

Heldur tú, at tað fer at hava týdning fyri avrikini hjá landsliðnum, at eydnan hesa ferð var við í lutakastinum?

– Tað eru fleiri spælarar, sum hava verið á landsliðnum í nógv ár, og sum hava spælt nógvar landsdystir. Fyri sovornar spælarar hevði tað ivaleyst kenst eitt sindur tungt, um luturin aftur hesa ferð hevði verið at spælt ímóti stóru tjóðunum í Eystureuropa, sum vit fleiri ferðir áður hava dystast við. Tá luturin fall á Týskaland, so sigur tað seg sjálvt, at hetta eigur at vera eyka íblástur fyri royndu spælararnar, heldur Todi Jónsson.

### Til Suðurafrika

Enn dugir Todi Jónsson ikki at siga, um tað fer at eydnast honum at koma á liðið hjá FCK, tá tað um tveir mánaðir aftur verður farið undir donsku landskappingina:

– Vit skuldu havt spælt venjingardyst ímóti B1913 leygardagin, men hann varð avlýstur, tí tað var kavi á vøllinum. Ætlanin var, at eg skuldi spæla síðsta hálva tíman. Komandi leygardag skulu vit spæla ein venjingardyst, og týsdagin í komandi viku fara vit á venjingarlegu í Suðurafrika. Har skulu vit vera í tvær vikur. Tað hevur sera stóran týdning fyri møguleikarnar hjá mær, at eg verði førur fyri at venja sum hinir, nú vit fara at fyrireika okkum til endaspurtin í landskappingini, sigur Todi Jónsson.



*Tá DM heitið varð endaliga vunnið, og serliga tá FCK spældi Europa Cup dystir ímóti t. d. Lazio, var talan um ein sýnisglugga, sigur Todi um møguleikarnir, sum skaðarnir hava spilt*

### Hugalig ferð

Fyri jól var Todi í fleiri vikur í Eysturríki, har hann fekk serliga venjing fyri at byrgja fyri vøddaskaðunum, sum hava verið so herviliga títtir.

– Hans Backe, venjarin hjá okkum, syrgdi fyri, at eg kom niður hagar. Onkuntíð kendist tað tungt at venja í Keypmannahavn. Bæði eg sjálvur og ivaleyst hini í FCK eisini ivaðust í, um tað nakrantíð fór at eydnast hjá mær at koma fyri meg aftur. Eingin veit enn, um tað fer at eydnast. Men undir øllum umstøðum kendist tað kveikjandi fyri meg at hava kensluna av, at tað vóru væl útbúgvin fólk, sum serliga tóku sær av mær.

Hevur tú hugsað um at gevast?

– Eg havi alla tíðina arbeitt fyri at koma fyri meg aftur. Tað hevur ikki altíð verið so stuttligt, men um tú skalt hugsa um at vera við í hesum spælinum, so nyttar ikki at kúra og at geva skarvin yvir. Eg hiti ein hálvan tíma meiri upp, enn hinir gera, og eg eri nógv í styrkisvenjingar rúminum. Hvør úrtøkan verður fara komandi dagarnir og komandi mánaðirnir at vísa, men tað er neyðugt at gera arbeiðið.

### Skeivu megin sýnisgluggan

Tað vil siga, at tú hevur slept øllum dreymum um landsliðið?

– Sum eg segði, so droymi eg ikki um landsliðið. Tað hevði verið ein stór avbjóðing at spælt ímóti Týskalandi. Men tað hevur størri týdning at síggja, hvussu dagurin í morgin fer at roynast.

Hvat hevur harmað teg mest hesar longu mánaðirnar, sum tú hevur verið skaddur?

– Málið hjá mær hevur altíð verið at sleppa aðra staðni at spæla fótbólt. Síðsta vár var eg toppskjútti í FCK, og eg var betri fyri, enn eg nakrantíð hevði verið. Tað er neyvan langt við síðuna av at rokna við, at líkindini fyri at sleppa aðra staðni vóru betri tá, enn tey høvdu verið. Eg hoyrdi ikki sjálvur um útlendskan áhuga, men eg sá og hoyrdi, hvat fjølmiðlarnir vistu at siga. Tá DM heitið varð endaliga vunnið, og serliga tá FCK spældi Europa Cup dystir ímóti t. d. Lazio, var talan um ein sýnisglugga. Tá harmaði tað meg almikið at sita aftanfyri fótbóltskeypmenninar og hyggja at dystunum í staðin fyri at spæla við, sigur Todi Jónsson, sum framvegis tykist eins jarðbundin, sum hann altíð hevur verið.



